Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	18.09.2026
Mál nr.:	25/29379
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælisfreist:	26.01.-02.02. 2026
Eftirkannað:	19.08.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin)
(Broytt áseting um time-charter)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 2005 um skatt av reiðarívirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 122 frá 9. desember 2016, løgtingslóg nr. 83 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 33 frá 26. mars 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 4, stk. 2, 2. pkt. verður strikað.

2. Aftaná § 4, stk. 3 verður sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 4.* Treytin í stk. 2 er ikki galdandi fyri skip, sum verður leigað við manning, time-charter, í upp til 36 mánaðir, tá skipið strategiskt og handilsliga verður rikið úr Føroyum."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi fyri inntøkuár, sum byrja 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið verður lagt fram, tí at mett verður, at verandi áseting um time-charter er ov avmarkandi.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip hevur gjørt vart við, at verandi avmarking í § 4, stk. 2, 2. pkt. í tonsaskattalógini um time-charter í upp til tveir mánaðir avmarkar part av vanliga virkseminum hjá føroyskum reiðaríum. Felagið hevur tí heitt á landsstýrisfólkið um at tillaga lógina og rætta tann skeivleika, sum felagið metir, at verandi orðing hevur við sær, so at føroysk reiðarí gerast meira kappingarfør.

1.2. Galdandi lóggáva
Í galdandi lóggávu er ásett, at skip, leigað við manning, time-charter, og sum ikki lúka treytirnar í § 4, stk. 2, bert kunnu verða í skipanini í upp til 2 mánaðir.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er lutvíst at herða galdandi áseting um time-charter til skip, sum verða strategiskt og handilsliga rikin úr Føroyum, og lutvíst at leingja tíðarskeiðið í galdandi áseting úr 2 mánaðum upp í 36 mánaðir.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður verandi áseting um leigu av skipi við manning, time-charter, og sum ikki lýkur treytirnar í § 4, stk. 2, avmarkað til skip, sum verða strategiskt og handilsliga rikin úr Føroyum. Harnæst verður tíðarskeiðið, sum time-chartraði skip kunnu verða undir tonsaskattaskipanini longt úr 2 mánaðum upp í 36 mánaðir.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppkotið hevur verið til hoyringar hjá Vinnuhúsinum vegna Reiðarafelagið fyri Handilsskip, TAKS, MEST, Felagnum Peningastovnar, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Advokatfelag Føroya og Sjóvinnustýrinum.

Frammanundan hevur uppskotið verið til undanhoyring hjá TAKS.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar, TAKS, Vinnuhúsið vegna Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Sjóvinnustýrið hava sent Fíggjarmálaráðnum hoyringarsvar.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar skriva í hoyringarskrivi sínum, at felagið hevur gjøgnumgingið uppskotið, men ongar viðmerkingar hevur til broytingarnar í tonsaskattalógini.

Fíggjarmálaráðið tekur til eftirtektar, at Felagið Føroyskir Grannskoðarar ikki hevur viðmerkingar til uppskotið.

TAKS skrivar í hoyringarsvari sínum m.a., at ein víðkan av undantakinum í § 4 í tonsaskattalógini kann økja um talið av skipum, sum lata seg skráseta hjá TAKS undir tonsaskattaskipanina.

Málsviðgerðin kann gerast drúgvari, um støða skal takast til, um skip strategiskt og handilsliga verða rikin úr Føroyum, og um TAKS skal heinta inn og skráseta upplýsingar um útlendskar, veruligar eigarar, og boða øðrum rættardømum (jurisdiktiónum) frá hesum, sambært BEPS Atction 5 on harmful tax practices, sum Føroyar sum limur í IF BEPS hava bundið seg til at fylgja, tá skráseting í tonsaskattaskipanini verður játtað.

Í hesum sambandi vísir TAKS á, at *Hvidvasksekretariatet* í *Den Nationale Risikovurdering af Hvidvask* (2022) metti, at váðin fyri hvítvaski gjøgnum feløg við skipum skrásett í FAS var **høgur.**

Fíggjarmálaráðið staðfestir, at TAKS væntar, at broytingin kann hava við sær meirarbeiði fyri TAKS umframt øktar vandar fyri misbrúki við atliti til hvítting.

Grundað á hesar viðmerkingarnar hevur Fíggjarmálaráðið valt eina varisliga broyting í reglunum um time-charter.

Vinnuhúsið skrivar vegna Reiðararfelagið fyri Handilsskip m.a., at t*ørvur er á dagførdum ásetingum um time-charter.*

Reiðarafelagið fyri Handilsskip hevur í samskifti við landsstýrisfólkið víst á týdningin av, at føroysk reiðarí hava møguleika til at leiga skip við manning, og at virksemið skal kunna vera fevnt av tonsaskattalógini í eitt longri tíðarskeið enn sambært galdandi lóg.

Tá ið Reiðarafelagið fyri Handilsskip í 2021 gjørdi vart við tørvin á, at feløg skulu hava møguleika at leiga skip sum time-charter í upp til tveir mánaðir, vóru hesar støður, sum eru lýstar niðanfyri, ikki nóg frammarlaga í huga.

Nú eru fleiri ítøkilig dømi um, at avmarkingin spennir bein fyri virkseminum hjá føroyskum reiðaríum, og tað hevur neyvan verið ætlaða endamálið við ásetingini.

Tað kunnu vera nógvar ymiskar orsakir til, at eitt reiðarí hevur tørv á at leiga eitt skip við manning (time-charter). Sum dømi kunnu nevnast:

1. Endurnýggjan av skipaflotanum
2. Umfatandi umvælingar
3. Nýtt virksemi
4. Mangul uppá tonnagu

Fíggjarmálaráðið dugir at síggja, at verandi áseting um time-charter kann vera í styttra lagi og hevur tí í uppskotinum lagt upp til, at ásetingin um time-charter í § 4 í tonsaskattalógini verður broytt úr tveimum mánaðum upp í 36 mánaðir.

Sjóvinnustýrið vísti í hoyringarsvari til viðmerkingarnar hjá stýrinum til upprunaliga uppskotið, sum stýrið sendi Fíggjarmálaráðnum tann 21. mars 2025.

Fíggjarmálaráðið tekur viðmerkingar hjá Sjóvinnustýrinum, sum í ávísan mun samsvara við viðmerkingarnar hjá TAKS, til eftirtektar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna, eftirsum uppskotið loyvir, at langtíðar time-chartraði skip, sum ikki lúka treytirnar í § 4, stk. 2, og sum strategiskt og handilsliga verða rikin úr Føroyum, eisini kunnu nýta tonsaskattalógina.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóða sáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóða sáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11 Skattir og avgjøld
Talan er um eitt skattauppskot.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrsfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Lógaruppskotið heimildar ikki viðgerð av persónsupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.18. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Talan er um eina fylgibroyting til § 1, nr. 2.

Nr. 2
Við uppskotinum verður ásetingin í § 4, stk. 2, 2. pkt. í tonsaskattalógini strikað. Í staðin verður eitt nýtt stk. sett í § 4, sum snýr seg um time-charter.

At skipið strategiskt og handilsliga verður rikið úr Føroyum merkir, at tær grundleggjandi strategisku og handilsligu avgerðirnar, sum reiðaríið sambært avtaluni um time-charter hevur ræði á, verða framdar úr Føroyum ella hava eitt veruligt tilknýti til Føroyar.

Hetta fevnir m.a. um handilsliga nýtslu av skipinum, avtalur og umsiting av charter- og fraktsáttmálum, marknaðaratgongd, kundasambond og fíggjarligar avgerðir knýttar at time-charter rakstrinum.

Funktiónir, sum sambært avtaluni um time-charter liggja hjá eigaranum av skipinum, undir hesum manning, tekniskt viðlíkahald og klassing, eru ikki avgerandi atlit í sambandi við metingina, hvørt skipið handilsliga ella strategiskt verður rikið úr Føroyum.

Metingin byggir á eina heildarmeting av handilsliga og strategiska virkseminum, sum reiðaríið reelt útinnir og hevur ræði á úr Føroyum.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 18. september 2026

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá TAKS
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Vinnuhúsinum vegna Reiðarafelagið fyri Handilsskip
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Sjóvinnustýrinum
Fylgiskjal 6: Áheitan um lógarbroyting frá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip